## Krabbar í Vági

Russisk skip, sum veiða krabba, hava lagt veiðina upp til frystingar í Vági seinastu tíðina. Í gjár var eitt russiskt skip á Vági við 170 tonsum av krabba, sum vórðu flutt á frystigoymsluna hjá Faroe Cold Store. Hetta er aðru ferð, at hetta krabbaskipið hevur lagt upp í Vági, og í síðstu viku var eitt annað skip har við krabba. Russisku krabbaskipini goyma krabban hjá Faroe Cold Store, haðani hann verður avskipaður av landinum.

*(Kelda: sudurras.com)*

## Minnispláta

Fyri góðum tveimum mánaðum síðani savnaðust eftirkomararnir hjá bóndahjúnunum Joen Paula Joensen (1858-1901) og Sophie Catrine Ziska í Innistovu (1848-1911) í Klaksvík. Nú hava tey sett forfedrunum eina minnisplátu um Innistovulonina, sum varð tikin niður fyrst í sekstiárunum. Plátan bleiv avdúkað seinasta sunnudag í býlinginum í Vági í Klaksvík og verður fest har seinni. Innistova í Klaksvík er gamal kongsgarður.

*(Kelda: Norðlýsið)*

# Gerhard Lognberg húðflettir sínar egnu

**Gerhard Lognberg húðflettir sínar egnu partamenn fyri at teir hava góðtikið skattlættan hjá samgonguni. Her má okkurt gerast, annars frykti eg fyri, at tað fer at kosta okkum dýrt á næsta vali, sigur hann**

SKATTALÆTTIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*– Javnaðarflokkurin skal ikki verða ein flokkur av snobbum, sigur Gerhard Logneberg, sum gevur sínum egnu partamonnum eina rættiliga skortfleingju*

– Javnaðarflokkurin er farin heilt av sporinum.

Gerhard Lognberg, løgtingsmaður fyri Javnaðarflokkin, vil ikki vita av skattalættanum, sum hansara egni flokkur og hansara egna samgonga, ætla at seta í verk hesi bæði næstu árini.

Hann vísir á, at skattalættin hjá samgonguni gevur teimum høgu inntøkunum nógv størri lætta enn tær lágu inntøkurnar fáa.

– Tað er ikki ein politikkur, sum Javnaðarflokkurin kann hava í sínum skjøldri, sigur hann.

### Ikki ein flokkur av snobbum

Og nú gevur hann sínum egnu partamonnum í Javnaðarflokkinum eina rættiliga skortfleingju fyri at hava góðtikið skattalættan. Samstundis ávarar hann tingmanningina hjá flokkinum staðiliga ímóti at venda fakfeløgunum bakið.

– Venda vit fakfeløgunum bakið, venda vit samstundis tí hugsjón bakið, sum flokkurin varð stovnaður upp á, sigur hann.

Hann heldur, at tað fer flokkurin at verða revsaður fyri á næsta vali.

– Venda vit fakfeløgunum bakið, frykti eg fyri, at tað fer at kosta okkum dýrt, tá ið val verður aftur.

Tí heitir hann á javnaðarflokkin um at finna aftur á sporið, heldur enn at verða ein flokkur av snobbum.

– Tað vóru verkafólkini og tey lágløntu, sum vórðu grundarlagið undir Javnaðarflokkinum og teimum eiga vit ikki at venda bakið. Vit eiga at rætta teimum okkara hond, ístaðin fyri at leggja kongin og onki gera. Leggja vit kongin, verða tað onnur og ikki Javnaðarflokkurin, sum fara at heysta fruktirnar av tí.

– Sum Javnaðarmaður má eg siga, at hetta er ein syndarlig gongd, leggur hann afturat

Tí heitir hann á javnaðarflokkin um at leggja á annan bógv, ongantíð ov skjótt.

### Eitt bragd

Kortini fegnast hann stórliga um, at Samhaldsfasti verður trýfaldaður í hesum valskeiðnum, so at hann verður einar 2300 krónur um mánaðin í 2008.

– Tað var eitt bragd av Javnaðarflokkinum, tí hetta ger rættiliga stóran mun hjá pensjónistum.

Men hann heldur, at Samhaldsfasti er ikki nóg mikið og hann heitti tí staðiliga á Javnaðarflokkin at bera so í bandi at skattalættin verður vendir á høvdið, so at tey, sum forvinna minst, fáa mest í lætta og tey, sum forvinna mest, fáa minsta lættan.

– At Samhaldsfasti verður styrktur, er ikki nóg góð grund fyri at góðtaka ein skattalætta sum hendan.

Hann heldur, at tað nyttar ikki at siga, at tey, sum forvinna so lítið, betala so lítlan skatt og tí kunnu tey heldur ikki fáa so stóran skattalætta.

– Eg veit bara, at tey, ið forvinna 150.000 - 200.000 krónur um árið, arbeiða minst líka hart, sum tey, ið forvinna eina millión. Og tey hava at kalla tað sama í føstum útreiðslum hvønn mánað.

### Ein hjálpandi hond

Hann var greiður yvir, at hetta verður fatað sum eitt álop á hansara floksfelagir í Javnaðarflokkinum og á samgonguna.

– Men tað er hetta ikki. Hetta er ein hjálpandi hond, tí sum javnaðarmaður kann eg ikki vera nøgdur tí tað er ikki rættvíst at lívga so væl um tey við teimum fúlu inntøkunum.

Nú hevur eisini verið frammi, at umboð fyri fakfeløgini ikki sleppa á fund við Javnaðarflokkinum?

Tað er ógvuliga harmiligt. Men tey skulu bara venda sær til mín, so skal eg skipa fyri fundi í eini handavending, sigur Gerhard Lognberg.

Men tú er við í eini samgongu, sum hevði avtalað hendan skattalættan frá fyrsta degi. Hví gert tú ikki vart við teg, fyrrenn nú??

– Tað er rætt, at samgongan avtalaði skattalættan. Men tá høvdu vit ongar talvur, sum vísti, hvussu hann fór at raka ávísar inntøkur. Men hetta er avgjørt ikki skattalættin, eg hevði ímynda mær, at javnaðarflokkurin fór at góðtaka. Eg hevði ímynda mær ein skattalætta til verkamannin og ikki til stjóralønirnar. Tað stendur heldur ikki í avtaluni um skattalættan, at hann skipast soleiðis, leggur hann afturat.

Gerhard Lognberg heldur tí, at Javnaðarflokkurin hevur ikki staðið nóg stinnur á varðhaldi, tá ið skattalættin varð lagdur til rættis.

Tí er tað ikki vist, at hann fer at atkvøða fyri skattalættanum, tá ið hann kemur til endaliga viðgerð í Løgtinginum, ein av næstu døgunum.

– Men vit eru 21 í samgonguni, so tað ger hvørki frá ella til, hvat eg atkvøði, tí tað skulu bara 17 atkvøður til fyri at samtykkja eitt mál. Kortini fari eg at gera, tað eg kann, fyri at fáa flokk mín aftur á rætt spor, leggur hann afturat.

Veitst tú eina góða?

Ring til Sosialin tlf 341800



# Gerhard hevur ikki rætt

**– Skattalættin er ikki í stríð við góðan javnaðarpolitikk, sigur Jóannes Eidesgaard, floksformaður**

POLITIKKUR
*Árni Joensen:*
*arni@sosialurin.fo*

Floksformaðurin hjá Gerhardi Lognberg skilir ikki atfinningarnar frá sandoyartingmanninum.

Jóannes Eidesgaard vísir á, at samgongan hevur framt skattalætta fyri tilsamans 240 mió. krónur, og at málið er at taka toppskattin frá teimum, sum hava vanliga inntøku.

– Tað er ikki í stríð við góðan javnaðarpolitikk at geva arbeiðsfólki, handverkarum og starvsfólki betri sømdir, sigur Jóannes Eidesgaard.

Hann ásannar, at tað ber sjálvandi altíð til at finna einstøk dømi, sum kunnu tykjast óheppin, og hann dylur heldur ikki fyri, at skattalættin hevði sæð øðrvísi út, um Javnaðarflokkurin hevði avgjørt tað sjálvur.

– Men eg haldi, at Gerhard skuldi heldur víst á, at føroyskir pensjónistar hava meri pengar um hendur enn teir donsku, nú vit hava megnað at útvega samhaldsfasta 175 mió. krónur, so útgjaldið verður tríggjar ferðir størri, enn tá vit komu í landsstýrið, sigur formaðurin í Javnaðarflokkinum.